VIÐMERKINGAR

# Pisakanningin og privatskúlar

ANNITA Á FRÍÐRIKSMØRK
Løgtingskvinna fyri Tjóðveldisflokkin



Pisakanningin loypti hvøkk á. Og man hon tala fyri seg. Nøkur hava hug at reisast úr sæti og venda pílinum ávísar ættir. Ein syndabukkur má jú finnast.

Sjálv tók eg initiativ til pisakanningina, tá ið eg sat sum landsstýriskvinna í MMR á heystið 2003. Var vorðin so troytt av øllum OECD kanningunum, sum fjølmiðlarnir bóru fram fyri okkum.Vit fingu jú bara at vita, hvussu nøkur av Norðurlondunum lógu í mun til onnur lond úti í heimi. Men fingu ongantíð at vita, hvar í Føroyar lógu í mun til hesi, tí vit vóru ikki við í kanningunum. Høvdu kanska lyndi til at halda, at Føroyar mundu liggja onkustaðni ímillum hini Norðurlondini.

Men nú hava vit tað so svart upp á hvítt. Og tey, sum hildu, at tað skuldu bara ganga 9 ár, til Føroyar taldu millum heimsins bestu lond, fáa nú at vita, at tey sum tá verða 24 ár, í dag verða mett javnt millum Mexico og Brasilia hvørs høvuðstrupulleikar er analfabetisma, gøtubørn og fátækradømi.

Nei, so galið kann tað ikki verða, hugsar onkur! Og rætt er tað. Pisakanningin sigur ikki alt um okkara ungdóm. Og langt frá tí.

Hon sigur t. d. onki um tað blómandi mentanarlívið, sum hesin sami umgdómur er við til at skapa nú meira enn nakrantíð. Og hvør veit, um ikki júst hesin skapandi førleikin hjá okkara ungu er kveiktur í fólkaskúlanum.

Hon sigur nógv um manglandi disiplin, men sigur so onki um, hví t.d. Mearsk er so altráur eftir hesum "ódisiplineraða" ungdóminum.

Nei, pisakanningin sigur ikki alt, men hon sigur nógv. Hon sigur m.a. at fimm tey fremstu londini í kanningini eru Finnland, Korea, Canada, Japan og Írland. Fimm lond, sum seinastu árini hava klára seg væl vinnuliga, og sum fyri tíðina eru búskaparligir motorvegir. Í hesum londum klára 15 ára gamlir næmingar seg eisini nógv best í pisakanningum. Her kundi sæð út til at vinnulig og búskaparlig menning og fólkaskúlaúrslit ganga hond í hond.

Um vit so útfrá hesi niðurstøðu kunnu siga, at føroyski fólkaskúlin eisini er eitt modell av tí samfelag, hann er partur av, veit eg ikki. Men spyr um krøv og um disiplin í føroyska samfelagnum annars; á føroysku arbeiðsplássunum, í føroysku heiminum. Í føroyska parlamentinum. Kanska eru hesi krøv og disiplin ikki altíð so langt frá tí, sum kanningin sigur um krøv og um disiplin í fólkaskúlanum.

Øll eru vit nokk samd um, at okkurt má gerast, og at tað ikki bara er tann eini faktorurin, sum er orsøkin til vánaliga úrslitið. Úttalilsini frá mentamálaráðharranum um at sláa kalt vatn í blóðið og um at seta ein arbeiðsbólk boðar ikki frá skúlapolitiskum broytingum. Men er heldur eitt boð uppá, at landsstýrismaðurin ikki veit, og ikki var til reiðar at taka ímóti einum so skelkandi úrslitið. Kanska er tað aftur her talan um manglandi disiplin og manglandi krøv til kontantar avgerðir. Hetta við arbeiðsbólkum er eftir hondini vorðið eitt haft um beinini á politiksa myndugleikanum. Og sum verður brúkt fyri at sleppa undan at taka støðu, og fyri at sleppa undan at vísa á politiskar visjónir. Eg vildi veruliga ynskt, at fjølmiðlarnir "kravdu", at landsstýrismaðurin kom við einum boði uppá broytingar ella reform. Men í staðin kemur ein av hansara partapolitisku partamonnum og sigur í samrøðu í dimmu 15.mai, at ein loysn á trupulleikanum er at fáa frískúlar á stovn, so almenni fólkaskúlin fær kapping. Og hann sigur samstundis, at Føroya Lærarafelag er við til at forða fyri hesum frískúlum. Avleiðingin av hesum, sigur hann verða, at "teir bestu lærararnir ikki sleppa at skara framúr, meðan teir minni góðu verða vardir".

Men hetta er ikki heilt rætt. Er áhugi fyri privatskúlum so eru foreldur og lærarar vælkomnir at seta hetta í gongd. Í mars 2002 samtykti løgtingi lóg um frískúlar. Í góð fýra ár hevur møguleiki sostatt verið fyri at seta á stovn frískúlar fyri næmingar frá 1 til 9 flokk enntá við almennum stuðli, sum svarar til 85% av læraralønunum.

(Lógin er nr 46, er frá mars 2002, og liggur inni á heimasíðu løgtingsins www.logting.fo.)

Men ongin sjónligur áhugi hevur verið fyri hesum møguleika enn. Hví ikki. Eru vit nøgd við verandi støðu? Ella eru vit líkaglað? Ella er tað ov møtimikið at fara í gongd við ein frískúla?

Eg veit tað ikki, men eg vóni, at um enn ein privatskúli verður settur á stovn, at hetta so verður hetta gjørt við tí fyri eyga at bjóða eitt pedagogiskt ella fakligt tilboð, sum er alternativ til fólkaskúlan.

Føroyski fólkaskúlin má styrkjast og teljast millum teir góðu fólkaskúlarnar í heiminum, tað eru vit samd um. Men tað verður ringt at krevja at krøv, disiplin og atmosphera annars skal verða annaðleiðis í fólkaskúlanum enn tað er í samfelagnum annars. So tað er ikki bara fólkaskúlin, sum hevur fingið nakað at hugsa um.

# Pisa-kanningin

PETUR HANS DAHL



Hjá einum, sum gekk í fólkaskúla og realskúla í 1950'unum, og sum hevur børn í fólkaskúlanum í dag, undrar tað ikki nakað serligt, at støðan er so vanlukkulig, sum hon er.

Fyri fyrst at lýsa støðuna tá, lat meg so siga, at hugburðurin var ein heilt annar, námsfrøðin var ein onnur, virðingin fyri lærarunum var ein onnur, og innlæruhátturin var eisini nógv øðrvísi. Fyri tað fyrsta, ein skuldi til prófvtøku hvørt ár fyri at halda fram í næsta flokki, tvs. prófvtøka frá 1. flokki upp í annan flokk, úr øðrum upp í triðja o. s. fr. Hetta eggjaði okkum kanska eyka at dríva á, var ein góð tilelving. Harnæst vil eg siga, at vit lærdu ramsur og setningar uttanat, sum seinni eru komnar einum til góðar í lívinum, t. d. abc-ið, setningar í støddfrøði, sálmar og sangir og mangt annað. Okkum børnum dámdi væl at læra uttanat, tað var eitt slag av sálarligum ítrótti, sum eg ikki ivist í hjálpti til at menna heilan. Í realskúlanum, sum kanska kann samanberast við framhaldsdeildina í dag, var eisini próvtøka hvørt ár, til tú í 4. real fór til tað endaligu próvtøkuna. Har skuldu vit upp í øllum lærugreinum, eingin lærugrein var valfrí hvørki í lestrartíðini ella til próvtøku. Eg sigi hervið ikki, at skipanin fyrr bert hevði fyrimunir. Ein vansi var, at tey, sum ikki kláraðu upptøkuna til 1. real ella ikki fóru til upptøku, skuldu halda fram í 6. og 7. flokki, til tey sum 14 ára gomul fóru úr skúlanum. Í nógvum førum vóru hesi meira ella minni forsømd. Skulu vit so ynskja okkum aftur til ta gomlu tíðina við sínum "kæft, trit og retning"? Nei!! Men vit kunnu læra nakað av henni og vita, um ikki nakað av tí kann nýtast í dag.

Tann nýmótans námsfrøðin, sum verður nýttur í dag, er tó farin ov langt yvir í hina veitina. Børnini hava ov nógv at siga í flokshølunum, hava ov fríar teymar og hava í summum føri nærum tikið ræði, og tað gongur út yvir undirvísingina og virðingina fyri lærarunum.. Harnæst skulu børnini nærum einki læra uttanat, tí tey skulu læra at hugsa sjálvstøðugt og skilja tað, tey læra. Tað er fyri so vítt rætt, men bert í ein vissan mun. Eg veit fleiri dømi um, at børn eru komin út úr 10. flokki og duga als ikki alfabetið. Hvussu í víðu verð skulu tey kunna sláa upp í eini telefonbók, orðabók ella øðrum, sum er skipað í bókstavarøð. Nógv duga heldur ikki lítlutabell. Ávísar lærugreinar eru valfríar, so tú kanst uppliva næmingar, sum koma út úr 10. flokki og hava ongantíð lært um t.d. lond í Asiu ella Afriku. Tann breiða almenna vitanin, sum fólkaskúlin fyrr borgaði fyri, er í dag farin fyri bakka, tað tori eg at pástanda. Eitt annað fyribrigdi, sum ár undan ári hevur verið við at lækka støðið, er, tá prófvtøl vera givin, kanska serliga til endaligar prófvtøkur í framhaldsdeildini. Hesi prófvtøl siga einum nærum einki, tí tey eru ikki treytaleys (absolutt). Meðaltalið fyri alt landið verður fyri hvørja prófvtøku sær funnið. Út frá hesum verða so tey einkultu próvtølini givin. Siga vit, at landsstøðið eitt ár er vánaligt, so er eitt 11-tal kanska bert eitt 8-tal og eitt 6-tal bert eitt 03!! Hetta kann føra við sær, at støðið lækkar hvørt ár.

At støðan í fólkaskúlanum er versnað í stóran mun, kann eg eisini siga í mínum arbeiði sum sjómansskúlalærari í 24 ár. Sum undirvísari í grundlærugreinunum máli og støddfrøði hevur ein fingið næmingar við støði í fólkaskúlanum gjøgnum øll hesi ár. Sigast kann tíverri, at hetta støði hevur verið javnt fallandi og hevur vónandi nú nátt botnin. Sum dømi kann nevnast, at eg ein dagin í einum skipsføraraflokki uppá 20 næmingar spurdi, hvussu høvuðsstaðurin á Philipsoyggjunum eitur. Ikki ein visti tað. Svarið var, at teir ongantíð høvdu havt tað í fólkaskúlanum, partar av lærugreinini landalæra vóru fyri tað mesta valfríir!!

Nógv kann gerast fyri at bøta um støðuna. Aðrastaðni gera skúlar eftirmeting av sær sjálvum við at senda spurnabløð út til børn og foreldur viðvíkjandi undirvísing, trivnaði og mongum øðrum. Á henda hátt kann skúlin kanska taka í egnan barm og avgreiða trupulleikarnar í føðinginitil frama fyri støðugt betrandi viðurskifti. Ein annar spurningur er eisini, um vit framvegis skulu halda fast um eindarskúlan. Var tað í sínari tíð rætt at avtaka millum- ella realskúlan og einsrætta frálæruna í einum eindarskúla? Nú er tað jú einaferð soleiðis, at vit eru ikki øll eins, summi eru betur egnaði til tað bókliga, meðan onnur egna seg betur til tað praktiska. Kanska kundu vit eftir 7. flokk býtt næmingarnar sundur í eina bókliga linju og eina praktiska (handverksliga) linju uttan at dottið í somu veit sum fyrr, at hesi vórðu meira ella minni forsømd. Eg haldi, at tað hevði bøtt nógv um tilelvingina (motiveringina) hjá næmingunum.

Vónandi vakna avvarðandi myndugleikar við kaldan dreym og seta tiltøk í verk. Hetta verður ikki lætt, tí allur hugburður má broytast, grundsjónarmið mugu broytast, og nýggj námsfrøðislig atlit mugu takast. Hesi tiltøk mugu vera álvarsom, um vit skulu hava nakran sum helst møguleika at náa Visión 2015.

## Siloakórið í Mentanarhúsinum

**Komandi sunnukvøld fer Siloakórið í Fuglafirði at hava sangløtu í Mentanarhúsinum í Fuglafirði**

**Fuglafjørður:** Kórið hevur vant og sungið síðani eina ferð í heyst. Nú verður skjótt farið í summarfrí. Okkurt árið hava tey verið uttanlands um hesa tíðina. Soleiðis verður ikki í ár. Tey sungu fyri fullari skúlahøll í Trongisvági síðsta sunnudag, og nú verður punktum sett við sangløtu í Mentanarhúsinum.

Í kórinum eru 30-40 sangarar. Flestu teirra eru ungfólk. Tey eru úr ymsum støðum og plássum í Eysturoy, og tey venja í Siloa í Fuglafirði hvørt mikukvøld undir leiðslu av Eyðuni á Lakjuni, sum hevur verið sangstjóri hjá kórinum síðani síðst í áttati árunum.

Skráin sunnukvøldið verður blandað. Hon fevnir frá eldri sálmum og til nýggjari og lættan sang og gospel. Sumt er útlendskt og annað er føroyskt. Í nøkrum førum eru bæði orð og lag sprottin í Fuglafirði. Bárður á Lakjuni fer at syngja tveir sangir, sum hann sjálvur fer at hava guitarundirspælið til.

Solosangarar eru Elisabeth á Lakjuni, Karlina Højgaard, Durita Mohr Jacobsen og Kristina Bærentsen. Jóhannes Simonsen spælir klaver, Bárður á Lakjuni spælir bass, og Jóhan á Lakjuni spælir trummur.

Sangløtan verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði sunnukvøldið 21. mai klokkan 20, og kostnaðurin er 30 krónur fyri vaksin.

**sb.**